ÍTRÓTTAR Sosialurin

Skálavenjarin um kvinnufinaluna í kvøld:

Vit hava ongan kjans!

- Sóleyð Mikkelsen verður ikki við orsakað av skaða, men dysturin fer kortini at vera undirjhaldandi: vit geva okkum ikki við tað góða og ætla heldur ikki at leggja dentin á verjuspælið, sigur Hans J. Andreasen

Í kvøld verður finalan í steypakappingini hjá kvinnunum. HB og Skála eru í finaluni, og tað verður onnur finalu-uppgerðin teirra millum á hesum sinni.

Fyrra finalan endaði við javnleiki 2-2, men í kvøld er tað antin ella: finalan skal avgerast. Og einki er at ivast í, at liðini bæði fara at leggja nógv í, fyri at vinna dystin. Bæði liðini eru kandidatar til FM-heitið, - Skála er fremst við 16 stigum og HB er nr. 2 við 14 stigum.

Við øðrum orðum: vinnarin í kvøld hevur møguleika fyri at vinna 'the double', meðan taparin kann koma at standa við tómum hondum, tá árið er av.

Liðini hittust í Havn landskappingini síðsta vikuskifti. HB vann 3-0 í einum dysti, ið var væl oman fyri meðal, hóast sera vánaligar umstøður.

- Eg vænti ikki, at vit hava nakran kjans, tí Sóleyð Mikkelsen er so skadd, at hon verður ikki við, sigur Hans J. Andreasen, venjari hjá Skálakvinnum. HB spælir eisini væl fyri tíðina, tí útisetarnir hava styrkt liðið munandi.

Skálavenjarin lovar, at talan verður ikki um at leggja doyin á verjuspælið.

- Dysturin skal avgerast, og tað kann tað sama henda fyrr sum seinni, sigur hann.

ówh

Nú er tími at venda við

Endaligur úrskurður er nú gjørdur í sonevnda MB-GÍ-málinum. Dómsnevndin staðfestir, at MB tapir dystin ímóti GÍ við málmuninum 0-0 og at GÍ fær tilluta tvey stig.

Tað einasta positiva í hesum er, at ein avgerð er tikin, soleiðis at rættiligt rok ikki kemur í ímóti kappingar-enda. Restin er bara grátt út yvir grátt. Uttan mun til, hvussu friðarligt hetta fer at spæla av, so er talan um størstu gølu í føroyskum ítrótti síðani 1964.

Krakkaveldið fjart frá alsveittum skfitisrúmum og snøggum graslíki hevur vunnið ein sigur, ið ongum tænir uttan teirra egnu fáfongd.

Uttan mun til motivini hjá GÍ - og tey kann eingin vita nakað um, uttan felagið sjálvt - so er hesin úrskurðurin við til at birta upp undir kæru-mentalitetin, - hesa marruna, ið hevur riðið føroyska fótbóltsheiminum í fleiri ár.

Tað mest syndarliga er, at feløgini hava mett málið sum eina søk, har bert MB og GÍ eru partar heldur enn at meta tað sum ein avgerandi prinsipp-spurning, ið viðkemur øllum feløgum. Var tað rætt, søgdu tey sína hugsan í tøkum tíma. Talan kann vera um vantandi fyritakssemi, og tað er at vóna, tí tað er illa hugsandi, at feløgini eru nøgd við úrskurðin. Á komandi aðalfuni mugu feløgini gera av, at hesin úrskurðurin ikki verður standandi sum varandi fordømi.

Løgfrøðiliga kann dómsnevndin døma sum henni vera vil, so leingi hon heldur seg til teir sektarmøguleikar, ið nevndir eru í kappingarreglunum (hon kundi t.d. koyrt MB úr kappingini). Nevndin hevur als ikki verið inni á spurninginum, hvørt MB hevur roynt at fingið sær fyrimunir (metir tað at vera uttan týdning), men kortini er hon farin so langt upp í revsikarminum sum at lata MB tapa dystin og lata GÍ fáa stigini.

Tað er eyðgivið, at harvið hevur hon gingið ímóti ætlanini við broyttu reglunum frá 1983 (grovari brotið, harðari revsingin). Harvið hevur hon eisini prógvað vantandi førleika til at umsita tær reglur, ið hon skal tulka. Hvussu sær eitt brot út, sum hevur ávaring við sær?

Tíðin er komin til at sleppa sær av við dómsnevndina, - ikki bert hesa, men yvirhøvir dómsnevndina við leikum fólki. Tríggir løgfrøðingar yvirtaka sessirnar, - antin sum kæru-instansur omanfyri kappingarnevndina (eins og nú) ella sum lógtulkinga-rráðgevi hjá kappingarnevndini.

ówh

FJALSGARÐUR
690 Oyndarfjørður · Tlf. 44522
Vallaraheim - setursskúli - skeiðhøli

Hotel NORÐ
FR-750 Viðareiði
Tlf. 51061
Telefax 51144
Telex 81367 paper fa

umbro umbro umbro umbro
Sparta-Sport
FR-510 GØTU
FØROYAR (FAROE ISLANDS)
Phone int. +298 41867
Fax int. +298 41938